# Bøtan av einkjupensiónini

Landsstýrið skýtur upp at reglurnar um einkjupensión verða broyttar soleiðis at yngri einkjur hava eins góð vilkor sum eldri.

Spurningurin um pensiónsviðurskiftini hjá einkjum hevur verið havdur á lotti í løgtinginum fyrr, har sosiala nevndin hevur heitt á landsstýrið um at arbeiða fyri, at vilkorini hjá yngri einkjum til at fáa hjálp verða eins góð og hjá teimum eldru, verður m.a. sagt í viðmerkingum til uppskótið, sum J. Lindenskov, landsstýrismaður legði fram seinasta hósdag, og hildið verður fram:

Landsstýrið hevur fingið ta fatan, at Føroya Løgting og Føroya fólk ynskja, at pensjónsviðurskiftini hjá einkjum gerast betri, og hevur eisini fatað tað, ið sagt er á tingi hesum viðvíkjandi soleiðis, at ein bati verður ynskstur fyri einkjur við børnum.

Landsstýrið hevur tingast við almannamálaráðið og fort fram, at reglurnar viðvíkjandi einkjupensjón eiga at verða broyttar, soleiðis at nógv fleiri einkjur fáa rætt til pensjón, og at eisini upphæddin verður hækkað.

Viðvíkjandi upphæddini heldur landsstýrið, at tað er skeivt, at einkjupensjónin bert er tann sama sum fólkapensjónin. Hógur aldur er nakað, sum ein hvør veit kemur til ásetta tíð. Avlamispensjónin er hægri enn fólkapensjónin, og kemur tað av tí, at avlamni, sum mangan kemur óvart, kanst tú ikki búgva teg til. Sostatt eigur einkjupensjónin heldur at verða sammett við avlamispensjón enn við fólkapensjón.

Almannamálaráðið er samt við landsstýrið um, at reglurnar um einkjupensjón eiga at verða broyttar soleiðis, at tær fevna um eina hvørja einkju við børnum eindir 18 ár.

Hinvegin er almannamálaráðið ikki samt við landsstýrið um eina hækking av sjálvari einkjupensjónini, men semja er tó um, at ein føroysk uppiskoytisveiting eigur ikki at hava ávirkan á einkjupensjónina.

Landsstýrið metir báðar hesar broytingar at hava stóran týdning fyri einkjurnar og skýtur tí upp, at forsorgarlógin verður broytt samsvarandi semjuni millum landsstýrið og almannamálaráðið, og at reglur um uppiskoytiveiting verða ásettar í løgtingslóg við heimild at rinda útreiðslurnar til hesa veiting úr landskassanum.

### Broytingar uppskot til forsorgarlógina

Hetta ber í sær, at treytirnar fyri einkjupensjón verða linkaðar. Sum er eingur bert (stórt sæð) tann kvinnan einkjupensjón, sum er vorðin einkja eftir at hon varð 45 ár.

### Uppskot til løgtingslóg

Hetta ber í sær, at einkjur undir 62 ár við børnum, og sum ikki hava stóra innroku, fara at eiga uppiskoytisveiting úr landskassanum.

Um frammanfyri standandi uppskot til løgtingslóg skal verða upplýst, at avlaminsviðbótin sum skotið verður upp at leggja til grund fyri uppiskoytisveitingina, 1. oktober 1976 var 670 kr. um mánaðan ella 8.040 kr. um árið.

Tá skipanin skal fáast í lag, verða útreiðslur uppá umleið 10.000 kr. til programmering og umleið 15.000 kr. til útriðararbeiði ella tilsamans umleið 25.000 kr. Landsstýrið roknar við, at Almannastovan síðani kann umsita skipanina uttan eykaútreiðslur.

Samlaðu nettoútreiðslurnar av uppskotinum til broyting í forsorgarlógini og av uppskotinum til løgtingslóg um uppiskoytisveiting eru mettar til 1,6 mill. kr. fyri landskassan og 0,8 mill. kr. fyri rikiskassan.




## Hini bløðini skriva

Gla ðustrok hevur grein um, ja sjálvsagt rúsdrekka. Tað er norski professarin við lærdómsstovnin fyri Kriminologi og revsingarrætt, Niels Christie, sum hevur skrivað grein í alheimstíðarritinum »The Globe«. Niels Christie er av tí áskoðan, skrivar Glaðustrok, at viðgerð og upplýsing eru ikki nóg árinsmikil ráð til at taka, men tú mást fremja allar hugsandi avmarkingar eisini viðvíkjandi atgongd til rúsdrekka.

Frá einum fyribyrgjandi sjónarmiði kann tað ikki leggjast nóg stór áherðsla á, at tað er her vit hava tann besta møguleikan at fyribyrgja vandamálunum.

Sum vit siggja, kunnu teir stórstu trupulleikarnir, so logið tað so enn kann ljóða, vera at finna hjá njótarum við ongum trupulleikum.

*Hvat er so at gera?*

*Jú, einastu ráðini til at taka eru m.a. hesi:*

1. *prísurin á rúsdrekka skal verða so hógur sum møguligt*
2. *útflýggingarstøðmi so fá sum møguligt.*
3. *tíðarfreistin frá bileggingini av rúsdrekkanum og til peningurin skal leggjast á borðið skal vera so stutt sum gjørligt*

*og at enda, skal alkoholinnihaldið í rúsdrekkanum, vininum og olinum verða so lágt sum møguligt.*

*Tástaðni vil heildarnýtslan av rúsdrekka minka nakað munandi, og tástaðni vilja rúsdrekkaskaðarnir gerast alt færri og færri.* (Gla ðustrok).

## Útdýpan og atløguplass í Runavík fyri 22 milj.

### Fyri henda pening fáast 670 metrar av kaiøki

Runavikar kommuna hevur í skrivi til løgtingið sent umsókn um, at studningurin, sum einaferð var játtaður til gerð av bryggju í Søldarfirði uppá 1 milj. kr. og til gerð av bryggju á Bakka á Glyvrum somuleiðis uppá 1. milj., verður hækkaður við enn eini miljón.

Sagt verður at virkið Bakkafrost, sum er kent um allar Føroyar, og nú eisini útum landamark, hevur ikki nóg góðar umstøður at arbeiða nóg rationelt, tá teir ikki hava havt bryggju til móttoku av ráevni og til avskipan. Tað er mest fyri at hjálpa hesum virki at søkt verður meiri stuðul, verður sagt.

Til útdýpan og gerð av atløguplássi í Runavík, hevur Runavikar kommuna søkt løgtingið um stuðul uppá 22.450.000 kr. Í umsóknini til tingið sigur býráðið, at tann strukturbroyting, sum í komandi tíð kemur at fara fram innan fiskivinnuna, kemur at seta stór krøv til havnirnar – skipini koma at verða fleiri dagar í havn enn áður, og tí mega skapast góð og trygg atløguplass, verður sagt.

Tað eru ikki góðar umstøður sum Runavikar kommuna hevur í dag, sigur kommunan og leggur aftrat, at stórur partur av havnini er so grunnur, at vanlig fiskiskip ikki sleppa at verandi atløguplássum.

Stórsta arbeiðsgevandi virkið í kommuni er p.t. Lyngfrost, og teir hava alt ov lítið kaiplass, og tað er tí so mangan at nógv ymisk arbeiði fara fram samstundis, – t.d. fiskiarbeiði, smíðjuarbeiði og upp og innskipan av vørum. Hetta er hvørki praktiskt ella hygieiniskt.

### Biligari enn vanligt

**Í skrivinum til løgtingið sigur kommunan í Runavík, at tað er stórur peningi, sum søktur verður um, men halda teir fram, at tá hugsað verður um metrapris, er hetta biligari enn vanligt. Hvør metur er her roknaður til 33.000 kr. og er tað tí, at meginparturin av arbeiðinum verður gjørdur uppi á turrum.**

Málið varð beint í landsstýrið.



Er nakað á vási, sum tú vilt hava í bløðini, so ring – vit eru til reiðar.

Telefon okkara er 11820.

## Hví altíð so ófullfíggjað?




Hví eru føroyingar so mongum forum inkonsekventir í atburði sínum? Hetta er ein spurningur, ein kann hoyra mangan útlending seta fram og ikki uttan grund. Sjálvir duga vit kanska ikki so væl at siggja tað, men sum fráliður munnu so eisini fleiri og fleiri heima á landi hava fingið tað fatan, at so er.

Eitt aktuelt dømi:

Postverkið varð yvirtikið 1. apríl í fjor, posturin gjørdist føroyskur hurtur av og mær er sagt, at nýggja føroyska postverkið fekk til gávus og púra ókeypis allar postbilar, postkassar og hvørt av sínum frá danska postverkinum (mundi eisini hóvuðsposthúsið í Havn vera uppí í? Tað er ikki langt ifrá). Hetta man sigast at vera einastandandi dømi um good will móti ti unga Føroyska postverki.

Nú, skjótt vóru allir postkassar í landinum málaðir blárr, hetta skuldi væl vera »offisielli« liturin hjá postverkinum. Men her kemur tað inkonsekventa. Samstundis fær postverkið sær í vissum forum nýggjar postbilar at koma aftrat ella ístaðin fyri teir gomlu donsku við gulum lit. Men, harrin hjálpi mær, bilarnir eru **grønir** av lit!...

Hevur man kjósað sær tann bláa litin, ja so má ein eisini føra hetta igjøgnum út í æsir, vera konsekventir, hava bláar bilar, møguliga eisini bláar búnar o.s.fr. Nakað heilt annað er, at eg og fleiri við mær halda hin bláa litin vera púra óhóskandi – hava ikki íslendingar henda litin, og hví skulu vit altíð fjeppast uppi í teimum? – nei, heldur skuldu vit havt **grønt** sum post-lit, tí oyggjarnar eru jú so vakrar grønar um summartíð, so tað hevði verið einasta náttúrliga, nú litskiftið fór fram, at taka hin grøna litin og at nýta hann konsekvent innan postverkið. Og ikki sum nú at koma



tvætlandi bæði við bláum, grønum, gomlum donskum gulum litum og hvat ið vit annars kunnu gleða okkum til.

Fáið skil á hesum, áðrenn tit sovna heilt á nýggja føroyska postverkinum. Har er gingið syndarliga aftur, viðvíkjandi service, ið hvussu er í Havn, síðani yvirtøkan varð framd og blást upp sum eitt satt tjóðarbragd.

NB. Ikki ófatandi, at unglingar í Havn stúttleika sær við at strika p'ið á postkossunum so, at har kemur at standa slætt og rætt: **ostur**.

Á ju.

Post fan